# Umfatandi sparingar

**90 milliónir í yvirskoti. Tað vísa turru tølini í álitinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini til fíggjarlógaruppskotið. Eitt nú skulu 61 milliónir sparast á almanna- og heilsuøkinum, millum annað á Landssjúkrahúsinum, á játtanini til fólka- og fyritíðarpensjónir, í barsils- og dagpeningaskipanini umframt øðrum almannaveitingum. Í uppskotinum er ikki lagt upp fyri lovaða skattalættanum, samtíðis sum samgongan væntar at fáa 30 milliónir meira inn í skatti næsta ár**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tá leið út á hóskvøldið eydnaðist loksins samgongulimunum í fíggjarnevndini at semjast um eitt álit til fíggjarlógaruppskotið, ið Karsten Hansen legði fram 30.september. Og sammett við upprunaliga uppskotið úr Fíggjarmálaráðnum, ið vísti eitt yvirskot uppá tvær milliónir krónur, tá avdráttirnir av landskassaskuldini eru goldnir, er yvirskotið nú vaksið upp í góðar 90 milliónir. Áðrenn avdráttirnir av skuld eru goldnir, er yvirskotið á fíggjarlógini fyri næsta ár vaksið úr 150 milliónum upp í 240 milliónir. Stívliga 83 milliónir eru skornar av útreiðslusíðuni, inntøkurnar eru mettar 30 milliónir hægri og so skulu íløgur gerast fyri 22,5 milliónir meira enn upprunaliga ætlað.

Nakrar lógarbroytingar, ið eru fortreytin fyri at roknistykkið gongur upp, eru longu farnar í løgtingið, meðan aðrar eru á veg.

### Spara á almanna- og heilsuøkinum

Størstu sparingarnar eru at hóma á almannaøkinum, har tilsamans 52 milliónir krónur eru skornar burtur, sammett við upprunaliga uppskotið til fíggjarlóg fyri 2003. Játtanin til er lækkað við 15 milliónum, játtanin til fyritíðarpensjónir er skorin við 10 milliónum, 11 milliónir skulu sparast innan dagpeningaskipanina, stuðulin til uppihaldspening, sum upprunaliga var settur til seks milliónir, er strikaður, 3,5 milliónir eru skarvaðar av játtanini til serforsorg, játtanin til barnaforsorg minkar við 3,2 milliónum og sparast skulu 4,5 milliónir á játtanini til vanliga forsorg. Hesar, umframt aðrar smærri reguleringar, gera at samlaða játtanin til almannamál, sum í fíggjarlógaruppskotinum var ásett til 1.254 milliónir næsta ár, nú verður 1.202 milliónir krónur.

Eisini innan familju- og heilsumál skal sparast. Meirilutin í fíggjarnevndini hevur skorið 8,3 milliónir av játtanini til landssjúkrahúsið, meðan 2,3 milliónir eru skornar av játtani til Klaksvíkar Sjúkrahús.

### Meira pengar til vegir

Í fíggjarlógaruppskotinum vóru seks milliónir krónur settar av til nýggjar landsvegir, men í sínum áliti mælir meirilutin í fíggjarnevndini til at brúka 27 milliónir til endamálið næsta ár. Millum annnað skulu sjey milliónir brúkast til vegagerð millum Øravík og Hov, seks milliónir skulu nýtast til vegagerð úr Skálabotni út á Strendur, eins og fimm milliónir skulu nýtast til vegin millum Gomlurætt og Havnina.

Pengarnir skulu millum annað fáast til vega við at skava sjey milliónir av játtanini til samferðsluhavnini í Suðuroynni og tvær milliónir av játtanini til samferðsluhavn í Kallsoynni, Skálafjarðarsiglingin skal niðurleggjast. Samanlagt lækkar játtanin til vinnumál við fýra milliónum krónum, sammett við fíggjarlógaruppskotið.

### Eingin skattalætti

Hóast samgongan frá fyrsta degi hevur boðað frá skattalætta, so er hædd ikki tikin fyri skattalættanum, hvørki í fíggjarlógaruppskotinum, ið landsstýrismaðurin í fíggjarmálum legði fram 30.september, ella í álitinum, sum samgongulimirnir í fíggjarnevndini løgdu fram hóskvøldið. Harafturímóti verður nú roknað við at inntøkurnar frá vanliga skattinum vera 20 milliónir hægri enn mett í fíggjarlógaruppskotinum, umframt at skattainnntøkurnar frá ymsum grunnum vera 10 milliónir hægri. Í sínum viðmerkingum til álitið sigur meirilutin tó soleiðis: »samgongan ætlar at gera skattalættar fyri einar hálvthundrað milliónir krónur. Effektin av hesi skattalækking verður væntandi ein hækking í inntøkunum uppá 10 milliónir krónur.«

Eftir at álitið frá fíggjarnevndini varð lagt fram klokkan eitt korter til tíggju hóskvøldið boðaði Edmund Joensen, tingformaður, frá, at onnur viðgerð av uppskotinum til fíggjarlóg verður á skránni mánadagin klokkan 10.

Δ



*Klokkan var farin av níggju hóskvøldið, tá álitið til fíggjarlógaruppskotið loksins kundi leggjast fyri tingið. Sammett við upprunaliga uppskotið úr Fíggjarmálaráðnum eru stívliga 83 milliónir skornar av útreiðslusíðuni, inntøkurnar eru mettar 30 milliónir hægri og so skulu íløgur gerast fyri 22,5 milliónir meira enn higartil ætlað, er niðurstøðan hjá Óla Breckmann og restina av meirilutanum í fíggjarnevndini.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Karsten ivast

**Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, setur spurnartekin við metingarnar hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, bæði á inntøku- og útreiðslusíðuni. Samtíðis fegnast hann tó um, at fleiri av ætlanunum hjá samgonguni síggjast aftur í álitinum úr fíggjarnevndini**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, var ein teirra, ið hevði leitað sær í løgtingið um níggju tíðina hóskvøldið, tá niðurlagdi tingfundurin varð tikin uppaftur. Eisini hann var komin at fáa sær eitt eintak av álitinum til fíggjarlógaruppskotið, ið fíggjarnevndin var liðug við fyrr um kvøldið, og sum tískil kundi leggjast fram.

Karsten Hansen sigur, at samgongan longu tíðliga í heyst var samd um fleiri sparingar. Men hesar krevja lógarbroytingar, og tí vóru fleiri teirra ikki við í fíggjarlógaruppskotinum, sum hann legði fyri tingið 30.september. Hesar eru síðan komnar við í álitið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini.

Men landsstýrismaðurin í fíggjarmálum setur tó spurnartekin við inntøkumetingarnar og skerjingina av játtanum til lógarbundnar útreiðslur, ið fíggjarnevndin er komin fram til.

Í álitinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini eru inntøkurnar av skatti og avgjøldum mettar 30 milliónir krónur hægri, sammett við upprunauppskotið úr Fíggjarmálaráðnum. Av hesum stava 10 milliónir frá eini lógarbroyting, ið áleggur grunnum at gjalda skatt, umframt tríggjar milliónir fáast til vega við rentuinntøkum frá Trygdargrunninum. Restin stavar frá at vónirnar til hægri skattainntøkur er settar hægri enn upprunaliga mett.

- Eg má siga, at sjálvur hevði eg ikki mett inntøkurnar hægri í dag, enn eg gjørdi í september, tá eg legði fíggjarlógaruppskotið fram, sigur Karsten Hansen.

Eisini á útreiðslusíðuni er landsstýrismaðurin ivasamur. Millum annað metir fíggjarnevndin, at lógarfestu útreiðslurnar til fólkapensjónir vera 15 milliónir krónur lægri næsta ár, sammett við uppskotið úr Fíggjarmálaráðnum. Karsten Hansen sigur, at hann hevur sæð eina meting frá Almannastovuni, ið vísir at játtanin møguliga kann lækka sjey milliónir. Men hvussu fíggjarnevndin er komin fram til eina skerjing uppá 15 milliónir, dugur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki at siga.

- Samanumtikið kanst tú siga, at metingarnar í uppskotinum frá fíggjarnevndini er ikki so varnar sum metingarnar hjá Fíggjarmálaráðnum. Í løtuni tykjast partar av uppskotinum heldur ivasamir, ti eg veit ikki, hvat meirilutin í fíggjarnevndini ætlar, sigur Karsten Hansen, ið enn ikki hevur fingið stundir til at útgreina mongu tølini í álitinum nærri.

### Skattalættin

Í sínum áliti hevur meirilutin í fíggjarnevndini mett at avleiddu inntøkurnar av einum komandi skattalætta vera 10 milliónir krónur. Men í álitinum eru ongir pengar settir av til skattalættan. Hetta váttar Óli Breckmann, formaður í fíggjarnevndini.

Óli Breckmann sigur, at í fyrstu atløgu verður bíðað eftir at Fíggjarmálaráðið kemur við einum uppskoti um at lækka skattin, men kemur einki uppskot haðani, má skattalættin koma aðrastaðin frá, t.d. sum uppskot frá limunum í fíggjarnevndini.

Sostatt er greitt, at hóast netto yvirskotið er vaksið úr tveimum upp í 90 milliónir krónur, so eru framvegis ikki pengar settir av til endamálið.



Bill Justinussen um familu- og heilsumál:

# Sleppa undan uppsøgnum

**Familju- og heilsumál hava fingið níggju milliónir skarvaðar av játtanini í upprunaliga fíggjarlógaruppskotinum. Talan er mest um fyrisetingarligar sparingar, sigur Bill Justininussen, landsstýrismaður**

FÍGGJARLÓG
*Heri á Rógvi*

Bill Justinussen skal skera níggju milliónir niður av sínari tillutaðu upphædd til familju- og heilsumál í fíggjarlógaruppskotið fyri 2003, nú málið er liðugt viðgjørt í fíggjarnevndini, og meirilutin hevur lagt sítt álit fram, sum eftir øllum at døma hevur fulla undirtøku í samgonguni.

Í fíggjarlógaruppskotinum vóru 540 milliónir settar av til familju- og heilsumál, men hetta tal er nú vorðið til knapt 331 milliónir – ein sparing áljóðandi 9 milliónir.

Størsta útreiðslan hjá Bill Justinussen og familju- og heilsuøkinum er Landssjúkrahúsið, og tað er eisini Landssjúkrahúsið, sum missir mest í álitinum frá fíggjarnevndini. 8,3 milliónir, sum ætlaðar vóru til Landssjúkrahúsið koma eftir álitinum at døma ikki til góðar hjá Landssjúkrahúsinum.

Klaksvíkar sjúkrahús fær 2,25 mió. minni, og Suðuroyar sjúkrahús fær 325.000 kr. minni. Eisini verður skorin av játtanini til familju- og heilsumálaráðið við 1,7 mió. Hinvegin fær familjuøki eina millión afturat, og so fáast 2,8 mió. meira í kassan frá láni til Húsalánsgrunnin.

### Fyriseting

Bill Justinussen sigur, at sparingarnar í mun til fíggjarlógaruppskotið, sum Karsten Hansen legði fyri tingið vegna landsstýrið, ikki fara merkja uppsagnir.

— Tað verður tann fyrisitingarligi parturin, sum verður skerdur. Sparingarnar raka størv og nýggj øki, sum ikki eru sett, sigur Bill Justinussen.

Landssjúkrahúsið hevði ætlað at seta fleiri nýggj størv, m.a til fyrisitingina, men hetta verður so ikki í 2003.

Eisini var ætlanin, at ein millión skuldi setast av til, at psykiatriska deild kundi hava opið um árskiftið, men mett varð ikki, at hetta var so átrokandi, tá ein stórur partur av sjúklingunum fer heim til familju um høgtíðina.

Bill Justinussen sigur, at meira enn tvær milliónir eisini verða spardar orsakað av, at gjøldini til ALS og Trygdargrunnin minka.

Bill Justinussen sigur, at sparingarnar á Klaksvíkar sjúkrahúsi heldur ikki raka verandi størv.

— Talan verður ikki um at lækka verandi tænastustøði, men verður spart verður í ætlanunum um at hækka tænastustøði, sigur Bill Justinussen.

Sum roknast kann við er Bill Justinussen ikki fegin um at skarva hesar milliónirnar av, men hann er kortini ikki meira ónøgdir enn, at hann kann taka undir við restina av samgonguni.

— Eg havi ikki lagt upp til oyðsl í sjálvum fíggjarlógaruppskotinum, og tí er tað sjálvandi keðiligt at skulu skera av. Men tá samgongan er samd um at tátta í, so skal hetta gerast á øllum økjum, og eg vil ikki ganga ímóti samgonguni, sigur Bill Justinussen, sum leggur afturat, at hann hevur gjørt alt tað, hann megnar, fyri at tryggja at sparingarnar raka sum minst.

### Rationalisera

Játtanin til serviðgerð uttanlands er sett til 70 mió. í fíggjarlógaruppskotinum, og hon verður tann sama, hóast tað í ár eru nýttar meira enn 80 milliónir til endamálið.

Orsøkin til, at hetta talið ikki verður hækkað er, at rationaliseringar á økinum skulu fremjast.

— Vit fara at seta ein persón, sum skal rationalisera skipanina, sigur Bill Justinussen. Hesin persónurin skal so syrgja fyri, at flogferðir skulu ikki kosta meira enn neyðugt, ikki fleiri fylgjarar enn neyðugt skulu vera við sjúklingunum osfr.

Bill Justinussen veit at siga, at myndugleikararnir hava royndir av, at ov nógvir fylgjarar í fleiri førum eru við sjúklingum til viðgerð uttanlands.

— Peningurin er settur av til viðgerðir, og vit raðfesta viðgerðir ovarligari enn fylgjurnar, sigur Bill Justinussen.

Hendan nýggja ætlanin hevur verið fyri hjá sjúkrahúsleiðslum og yvirlæknum, og øll eru samd um, at tað eru møguleikar at spara, sigur Bill Justinussen.

Eisini skal ein partur av eftirviðgerðini flytast til Føroya, og harvið nógvar ferðaútreiðslur sparast.

Páll á Reynatúgvu:

# Mugu eftirkanna metingarnar hjá fíggjarnevndini

**Fíggjarnevndin hevur skorið 52 milliónir av játtanini til almannamál, millum annað eru lógarbundnar útreiðslur til fólkapensjónir og fyritíðarpensjónir metar 25 milliónir lægri enn upprunaliga mett.**
**– Hesi tøl samsvara ikki við okkara metingar, og tí fari eg at eftirkanna tey beinanvegin, sigur Páll á Reynatúgvu, ið annars fegnast um at eldraøkið framvegis er raðfest høgt á fíggjarlógini**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Nú fíggjarlógaruppskotið er komið aftur úr fíggjarnevndini eru tilsamans 52 milliónir skornar av játtanini til almannamál. Játtanin til fólkapensjónir er lækkað við 15 milliónum, 10 milliónir minni skulu setast av til fyritíðarpensjónir og 4,5 milliónir vera minni á kontoini til forsorg.

Páll á Reynatúgvu sigur, at tølini frá fíggjarnevndini ikki samsvara við metingarnar hjá Almannamálaráðnum, og tí fara tey nú at eftirkanna tølini.

- Vit fara beinanvegin at eftirkanna tølini, og ætli eg mær at hava eina nýggja meting klára til 2.viðgerð av fíggjarlógini, sigur Páll á Reynatúgvu. Hann vísir á, at talan er um lógarbundnar útreiðslur, og tí vísir tað seg, at tølini frá fíggjarnevndini ikki halda, mugu antin meira pengar játtast, ella mugu lógarbroytingar gerast.

Landsstýrismaðurin í almannamálum sigur, at Almannamálaráðið sendi fíggjarnevndini síni tøl, men nevndin hevur ikki valt at fylgja hesum metingunum, staðfestir Páll á Reynatúgvu, ið fekk fíggjarlógarálitið fríggjamorgunin.

Í sínum áliti mælir meirilutin í fíggjarlógini til at 11 milliónir kunnu sparast av útreiðslunum til dagpengaskipanina. Hetta skal gerast við at broyta lógina um karensdagarnar.

### Eldraøkið framvegis høga raðfesting

Samtíðis sum samlaða játtanin til almannamál er skerd við 52 milliónum fegnast Páll á Reynatúgvu um, at eldraøkið framvegis er raðfest høgt í samgonguni.

- Eg fegnist um, at tær uppraðfestingar á almanna- og serliga eldraøkinum, ið vóru settar á fíggjarlógaruppskotið, framvegis eru at síggja, nú uppskotið kemur aftur úr fíggjarnevndini, sigur Páll á Reynatúgvu.

Sambært álitinum hjá meirilutanum hjá fíggjarnevndini fara 1,2 milliard krónur av fíggjarlógini næsta ár til almannaøkið.

## Minnilutin vil leggja saman ráð

**Minnilutin í fíggjarnevndini ætlar at spara á fíggjarlógini við at leggja ráð saman og flyta sendistovu**

FÍGGJARLÓG
*Heri á Rógvi*

Tað er fatanin hjá minnilutanum í fíggjarnevndini, at munandi sparingar kunnu finnast aftur á fíggjarlógini, og hetta skal gerast við at leggja ráð saman og strika sendistovur.

Minnilutin telir Lisbeth L. Petersen og Johan Dahl úr Sambandsflokkinum og Vilhelm Johannesen úr Javnaðarflokkinum.

Løgmansskrivstovan og løgmálaráðið skulu framhaldandi vera eitt ráð.

Oljumálaráðið skal leggjast saman við vinnumálaráðið, og hetta merkir eina sparing upp á 5 milliónir.

Samstundis skal skilnaðurin í Trivnaðarmálaráðnum ikki fara fram, sum ætlað. Talan skal framhaldi vera um eitt og sama ráð undir heitinum Trivnaðarmálaráðið.

Og nýggja sendistovan í London skal eisini flytast.

— Minnilutin metir, at føroysku áhugamálini, sum í stóran mun snúgva seg um fiskivinnu og oljuvinnu, eru betri vard við eini viðskiftastovu í Aberdeen, heldur enn við eini kostnaðarmiklari sendistovu í London. Út frá hesum mælir minnilutin til, at játtanin verður lækkað við kr. 3.500.000, sigur minnilutin í álitinum.

## Spara 15 mió í arbeiðsmarknaðargjøldum

Í sínum royndum at tálma útreiðslunum á fíggjarlógini hava politikararnir fingið eina hjálpandi hond orsakað frá lækkingum í arbeiðsmarknaðargjøldum. Herfyri gjørdi stýrið fyri ALS av at lækka inngjaldið til Arbeiðsloysisskipanina við 0,75 prosentum, úr 1,25 niður í 0,5 prosent. Og í hesum døgum arbeiðir landsstýrismaðurin í fíggjarmálum við at strika inngjaldið í Trygdargrunnin, har arbeiðsgevarar higartil hava skula goldið 0,15 prosent av lønargjaldinum til.

Tilsamans er talan um at arbeiðsgevarar, og harvið eisini landskassin, spara 0,9 prosent. Fyri landskassan er talan um eina sparing uppá 15 milliónir krónur um árið.

**jbh**

## Norðoyatunnilin ikki á fíggjarlógina

Tað verður yvirskotið á fíggjarlógini í ár, ið skal brúkast til at gjalda tær 32,5 milliónirnar, ið løgtingið hevur samtykt at seta av til Norðoyatunnilin næsta ár. Hvørki samgonga ella andstøða hava Norðoyatunnilin við í sínum fíggjarlógaráliti.

Hóast løgtingið hevur bundið seg til at játta 32,5 milliónir krónur til Norðoyatunnilin næsta ár, so sæst játtanin ikki aftur, hvørki í upprunaliga fíggjarlógaruppskotinum ella í álitinum, ið varð lagt fram hóskvøldið.

Í staðin skulu pengarnir til tunnilin finnast á yvirskotinum hjá landskassanum í ár, og síðan játtast við eini eykajáttanarlóg.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur seg ikki duga at síggja nakað skeivt í hesum.

- Millum 40 og 45 milliónir krónur leypa av í óbrúktum játtanum í ár, og tí haldi eg tað vera natúrligt at framskunda aðrar íløgur. Tú kanst siga, at meðan onkur íløga verður útsett, verða aðrar gjørdar áðrenn upprunaliga mett – tídningarmiklast er at samlaða talið ikki gerst størri enn mett, sigur Karsten Hansen.

At andstøðan heldur eisini letur sær lynda, at Norðoyartunnilin ikki kemur á fíggjarlógina fyri næsta ár sæst í teirra felags áliti til fíggjarlógaruppskotið. Har er heldur ikki ein króna sett av til Norðoyatunnilin.

**jbh**